## Sparin køliskáp

Frá 1. juli sleppa fólk í Belgia ikki at brúka onnur húsarhaldstól enn tey, sum eru serliga orkusparandi, og nú heldur danski flokkurin SF, at danir eiga at taka sama stigið. Flokkurin heldur, at handlarnir eiga bara at sleppa at keypa køliskáp, frystiboksir, vaskimakinur og onnur stór húsarhaldstól, sum brúka so lítla orku sum gjørligt. Danir noyðast kortini at bíða eftir ES, sum ikki hevur góðkent balgisku avgerðina enn.

## Fíggingin ikki funnin

Grønlendska landsstýrið hevur skotið upp eina nýskipan á pensjónsøkinum, men í gjár kom fram, at landsstýrið hevur ilt við at finna ta neyðugu fíggingina til ta nýggju skipanina. Aleqa Hammond, landsstýrismaður í almannamálum, sigur, at 53 mió. krónur vanta í fíggingina. Hon ásannar, at tað kann gerast neyðugt at hækka skattin, men hin samgonguflokkurin, IA, er als ikki fegin um tað hugskotið, sigur útvarpið í Nuuk.

# u surimi-verkætlanina



*Hann prýðir forsíðuna í føroyska Skipalistanum í ár, og hann hevur verið okkara stoltleiki seinasta árið. Skjótt verður føroyska flaggið vundið av stong, og skipið fer í Suðuuríshavið at fiska krill, tá ið tað er umbygt til hesa veiði og framleiðslu*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

nú so nógvir »bóltar« eru í luftini í senn, sigur hann.

### Veikari grundarlag

Jákup Sólstein er sera harmur um, at Atlantic Navigator gevst í føroyskum sjógvi í heyst, og hann gevur Hanusi Hansen rætt í morgun av tí, ið ført hevur verið fram um, at politisku signalini eru viðvirkandi til avgerðina, sum nú er tikin.

- Surimi-verkætlanin er ein ógvuliga kostnaðarmikil verkætlan, og tað eru fleiri viðurskifti, sum gera hesa ætlan minni áhugaverda hjá teimum, sum standa aftanfyri hana.

Hann vísir á, at tað ikki einans eru tey politisku signalini, sum eru tyngjandi, men eisini tann vøksturin, sum var í hýrunum seinasta heyst, tá ið skipið lá í fleiri vikur.

- Nýggju sáttmálarnir, sum gjørdir vóru við manningarfeløgini, gjørdust munandi dýrari enn teir, ið vóru frammanundan, og hetta hevur sjálvsagt tyngt um raksturin av skipinum.

Jákup Sólstein sigur seg ikki vilja hava »hangandi«á sær, at manningin við Atlantic Navigator nú tjenar ov nógv, men heldur, at neyðugt er at síggja veruleikan í eyguni.

- Tað er eitt stórt tal av fólki, ið skal lønast við tí, sum kemur í last og tangar, og tá ið hetta er ein kostnaðarmikil vinna at vera í, er torført at fáa ætlanina at hanga saman – og kasta av sær, ið sjálvandi er málið hjá teimum, sum reka skipið.

Formaðurin í Reiðarafelagnum hevur eisini hoyrt Hanus Hansen siga frá einum fundi, sum hevur verið í Fiskimálaráðnum.

- Hetta var ein fundur, sum umboð fyri føroysku og norsku eigararnir saman við útlendskum fíggingarumboðum høvdu við embætisfólk í Fiskimálaráðnum. Sum eg havi skilt, var landsstýrismaðurin, Bjørn Kalsø, ikki við á hesum fundi.

Jákup vísir á, at umboðini fyri eigararnar og útlendsku fíggingarstovnarnar skiltu á føroysku embætisfólkunum, at ætlanin er at broyta reglurnar fyri útlendskum eigaraparti í føroyskum feløgum.

- Hanus hevur sagt, at politisku signalini á hesum fundi vóru, at útlendskur eigarapartur í føroyskum feløgum ætlandi skal minka úr 33% niður í 20%.

### Kvotuparturin

Jákup Sólstein vísir á, at uppskotið um, at einki felag skal kunna ráða yvir meira enn 20% av einum fiskaslagi í einum bólki, í longdini kundi verið tyngjandi fyri Atlantic Navigator.

- Skipið fiskar av felagskvotu, og vit vita, at niðurskurðir verða í heildarkvotuni tey næstu árini. Skipið skal helst fiska eini 60.000 tons av svartkjafti um árið, um raksturin skal hanga saman, og tá er ikki vist, at 20% høvdu verið ein nøktandi partur.

Formaðurin í Reiðarafelagnum væntar, at skipið longu um eitt ella tvey ár hevði rent seg upp ímóti hesum kvotuloftinum.

Sambært uppskoti landsstýrisins, skulu tey feløg, sum í dag veiða meira enn 20% av kvotuni, framhaldandi kunna fiska hesa nøgd, t.v.s. at tey longu hava tryggjað sær søgulig rættindi til ein størri kvotupart.

- Vit eiga sum er eini 300.000 tons av svartkjafti at býta millum øll skipini hjá okkum sum veiða svartkjaft, og alt bendir á, at heildarkvotan fer at minka.

Jákup Sólstein sigur, at Atlantic Navigator bara hevur havt svartkjaftin at dúva uppá, meðan onnur føroysk nóta-og trolskip eisini hava havt sild og makrel.

### Láglønarskip

Formaðurin í Reiðarafelagnum heldur, at ein annar máti at styrkt grundarlagið undir surimi-verkætlanini, kundi verið partvís at havt manning úr láglønarlondum umborð á skipinum, soleiðis at samlaði hýruposturin kundi verið minni, enn hann er í dag.

- Tað er ikki vist, at ein slík verkætlan, sum krevur so stórar íløgur, kann berast í einum hálønarsamfelag sum okkara, sigur Jákup Sólstein.

# Grindamenn bjóða til ársfund í morgin

**- Vit samlast til hugnaliga samveru og prát í Norðurlandahúsinum klokkan 11 og vóna, at grindaformenn, varaformenn og sýslumenn møta fjølmentir. Sjálvur aðalfundurin byrjar klokkan 13.30, sigur Ólavur Sjúrðarberg, formaður í Grindamannafelagnum**

ÁRSFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Grindamannafelagið fer at halda ársfund í morgin.

Eins og undanfarin ár, bjóðar felagið aftur í ár øllum sýslumonnum, grindaformonnum og øllum varagrindaformonnum til hugnaliga samveru, áðrenn sjálvur aðalfundurin byrjar.

- Vit samlast soleiðis í Norðurlandahúsinum í morgin klokkan 11, og vit vóna, at grindaformenn, varaformenn og sýslumenn møta fjølmentir. Vit vóna eisini at fáa eitt gott og lívligt prát, nú hetta høvið enn einaferð býðst, sigur formaðurin í felagnum, Ólavur Sjúrðarberg.

### Aðalfundurin

Sjálvur aðalfundurin hjá Grindamannafelagnum byrjar klokkan 13.30 í Norðurlandahúsinum, og á hesum fundi fer formaðurin at leggja fram frágreiðing felagsins í farna ári.

Á skránni er eisini framløga av grannskoðaðum roknskapi og val av tveimum nevndarlimum og trimum varalimum.

Sambært skránni, skal grannskoðari eisini veljast, eins og limagjaldið skal ásetast.

At enda á aðalfundinum verða innkomin mál tikin til viðgerðar, og at enda verður høvið at tosa um ymiskt, sum rørist innan grindamannaøkið.

### Fyrilestur

Eftir sjálvan aðalfundin fer Jóan Pauli Joensen, professari, at halda fyrilestur um grindabýtið fyrr, nú og við ábendingum ella hugsanum um, hvussu hetta kann skipast í framtíðini.

- Vit vóna, at vit fáa eitt gott og áhugavert prát um evnið, sigur formaðurin í Grindamannafelagnum, Ólavur Sjúrðarberg.



*Grindamannafelagið bjóðar til hugnaliga samveru klokkan 11 í morgin, og klokkan 13.30 verður sjálvur aðalfundurin í Norðurlandahúsinum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*